TING-HELLAN

# Størri uttanríkispolitiska heimild ella skerd tjóðarrættindi?

TINGHELLUKRONIKK
*Kristina Háfoss*



**Føroyingar skulu nú umboða "Ríkið" í uttanríkismálum, ið bert viðvíkja Føroyum. Hesum boðaði danski forsætismálaráðharrin - Anders Fogh Rasmussen - enn einaferð frá, herfyri. Spurningurin er bara hvat veruliga endamálið er.**

**Føroyingar hava nevnliga í dag rætt til at umboða seg sjálvar í altjóða høpi. Løgfrøðisliga er ongin forðing fyri sjálvstøðugari føroyskari umboðan í uttanríkismálum - forðingin er politisk.**

**Heldur enn at økja um sjálvstýrið, kann ein nýggj løgfrøðilig binding millum Føroyar og Danmark, ið ikki er grundað á altjóða rætt, bera við sær skerd tjóðarrættindi.**

### Føroysk ávirkan ein hypotetisk støða ?

Føroyingar hava latið donskum myndugleikum mál at umsita. Tí hava føroyingar í dag sera avmarkaðan avgerðarrætt á uttanríkisøkinum og stórtsæð ongan avgerðarrætt tá umræður eitt nú altjóða felagsskapir og trygdarmál.

Hetta kom ikki minst til sjóndar, tá danski forsætismálaráðharrin seinast varð á vitjan í Føroyum og varð spurdur um, hvørt hann vildi viðurkenna um føroyskir myndugleikar søgdu nei til útbygging av NATO-støðini. Svarið varð, at hetta var ein "hypotetiskur spurningur", ið hann ikki vildið svara. Júst tað sama segði hann, tá hann varð spurdur um hetta í grønlendskum høpi. Hendingarnar í samband við Thule í Grønlandi, har danskir myndugleikar arbeiddu ímóti ynskinum hjá grønlendsku myndugleikunum, geva tíverri illgruna um, at tá danski forsætismálaráðharrin nevnir nakað ein "hypotetiskan spurning", er nógv sum bendir á, at hetta merkir, at spurningurin ikki er viðkomandi, tí eru føroyingar, grønlendingar og danir ikki samdir eru tað donsku sjónarmiðini, ið vinna frama.

### Ikki trygdarpolitikk, Norðurlandaráðið og IWC

Harvið kann stórt spurnartekin setast við lyftini hjá danska forsætisráðharranum herfyri um, at Føroyar skulu umboða "Ríkið" í uttanríkismálum, ið viðvíkja Føroyum burturav. Hetta er eitt lyfti, ið kann tulkast sera breitt - og kann skjótt gerast fín orð uttan veruligan vilja, ið skal bera orðini til gerð. Tí um nakað viðvíkir Føroyum, so má tað verða útbyggingar av NATO-støðini í Føroyum, nýtsla av føroyskum loftrúmi, limaskapur í Norðurlandaráðnum v.m..

Hóast hetta hevur danski forsætismálaráðharrin fyrr boðað frá, at lyftini um økt sjálvstýri til Føroyar og Grønland á uttanríkispolitiska økinum IKKI fevna um trygdarpolitikk, og sum kunnugt heldur ikki um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum (sum eitt einmælt samt Løgting ynskir). Leggjast skal afturat, at føroyingar heldur ikki hava fingið loyvi at umboða seg sjálvar í altjóða hvalaveiðufelagsskapinum IWC.

Tá sjálvstøðug umboðan tá umræður Norðurlandaráðið, hvalaveiðu og trygdarmál ikki kemur uppá tal, verður áhugavert at síggja á hvørjum økjum danska stjórnin hevur hugsað sær, at føroyingar skulu hava sjálvstøðuga umboðan.

### Óbeinleiðis samtykt av eindarstatinum ?

Velja føroyingar at átaka sær økta ábyrgd og ávirkan á uttanríkispolitiska økinum eigur hetta ikki at verða grundað á, at føroyskir myndugleikar umboða "Ríkið". Føroyskir myndugleikar skulu umboða Føroyar.

Men danskir myndugleikar vilja verða við, at Føroyar ikki kunnu umboða seg sjálvar - bert "Ríkið". Danska stjórnin hevur ferð eftir ferð víst á, at hon metir, at danska ríkið er eitt eindarríki, har bert ein tjóð er til, og tað er tann danska tjóðin. Tí er ikki óhugsandi, at danska stjórnin við at fáa føroyskar og grønlendskar at umboða "Ríkið" soleiðis royna óbeinleiðis at fáa eina viðurkenning frá føroy-ingum og grønlendingum av, at danska ríkið er ein eindarstatur.

Velja føroyskir myndugleikar at umboða Danmark og Grønland í altjóða høpi umvegis eina lóg - uttanfyri heimastýrislógina - ið skal heimila hesum *(hetta er eitt krav frá danskari síðu, hevur danski forsætismálaráðharrin boðað frá),* kann stjórnar- og ríkisrættarliga støða Føroya - sæð við altjóða eygum - skjótt gerast ein onnur enn núverandi. Hetta kann møguliga skiljast sum at føroyska landsstýrið á henda hátt óbeinleiðis tekur undir við at danska ríkið er ein eindarstatur - og ikki eitt ríki við trimum tjóðum. Hetta er ein støða, ið møguliga kann seta tjóðarrættindi føroyinga í vága.

### Økt sjálvstýri skal grundast á fólkarættin

Føroyskir myndugleikar skulu átaka sær fulla ábyrgd og ávirkan á uttanríkisøkinum, men neyðugt er at verða varin, tá umræður løgfrøðisligar broytingar í samstarvinum við Danmark í framtíðini. Skulu broytingar gerast er alneyðugt, at einhvør broyting byggir á tey tjóðarrættindi, ið Føroyar hava sambært altjóða rætti. Men hetta eru rættindi, ið danska stjórnin higartil ikki hevur viljað viðurkent og tí er sera lítið sannlíkt, at ein møgulig nýggj lóg vil verða grundað á hesi.

### Manglandi vilji - ikki manglandi heimild

Føroyski atlimaskapurin í

*Framhald á síðu 28*

# Forlagsráðgeving

TINGHELLUKLUMMAN
*Finnbogi Ísakson*



Tað var Carl Johan Jensen, sum í einum ummæli í sendingini *Kultura* herfyri morlaði krimiskaldsøguna *Meðan sólin í eystri roðar* eftir Jóannes Kjølbro sundur í sand og øsku.

Nú havi eg lisið hesa skaldsøguna - hon er skjótt lisin - og haldi, at hon hevði frægari uppiborið. Hon er einki vánaligari enn so mangar aðrar krimisøgur, eisini tær útlendsku. Rætt er tað, at hetta er ein frásøga, ein einføld forteljing, og ber ikki brá av at vera modernistiskur litteraturur, sum ongin skilir eitt vet av. Tað slagið av bókmentum, tykir mær, hevur ta keðiligu ávirkan, at fleiri og fleiri fólk hyggja meira og meira at fjaðurløttum sjónvarpssendingum heldur enn at lesa eina bók. Teir høvundarnir áttu at lagt sær orðini hjá Tegnér í geyma: *Det dunkelt sagda är det dunkelt tänkta.*

Kanska hevur tað nervað Carl Johan Jensen, at høvundurin eftir innihaldinum at døma ikki hevur so gott eyga á teimum vinstrahallu, serliga ikki gomlum Framamonnum. Kanska hevur hann heldur ikki serliga gott eyga á fullveldisætlanunum. Hetta seinna átti so eisini at nerva meg, men eg haldi, at ein høvundur eigur at hava víðar ræsur, eisini tá tað kemur til sympati og antipati.

Ein krimisøga skal vera spennandi. Hendan er líka spennandi, sum so mangar aðrar. Um Jóannes er at siga tað sama, sum pápin Ewald Kjølbro onkuntíð segði um onkran annan: *Hann er ikki óeffin við penninum!*

Tað var eisini Carl Johan Jensen, sum fyri nøkrum árum síðani mælti til, at vit fingu eina forlagsráðgeving í lag í Føroyum. Og ta ferðina var skil í tí, hann segði.

Í grannalondunum, sum øll eru størri og fólkaríkari enn okkara, er tað ikki so vanligt, at bøkur verða givnar út á egnum forlagi. Har roynir tann, sum hevur skrivað eina bók, at fáa eitt stórt (helst) ella lítið forlag at geva hana út. Forløgini hava ráðgevarar, sum fara kritiskt ígjøgnum tey handrit, sum verða send inn. Mong verða kolldømd og verða als ikki givin út. Í øðrum førum - teimum flestu - gera køn fólk viðmerkingar, og høvundurin verður biðin um at gera broytingar í teksti, raðfesting ella innihaldi sum heild. Hann ger klókt í at fylgja leiðbeiningunum, annars skal hann ikki rokna við, at forlagið gevur bókina út.

Hjá okkum er tað rættiliga nógv øðrvísi. Mangir høvundar geva sjálvir tær bøkurnar út, sum teir skriva. *Egið forlag* kallast tað tá í flestu førum. Tað ber tó eisini til at geva forlagnum annað navn, sjálvt um tað bara gevur bøkur hjá eigaranum sjálvum út. Til dømis havi eg kallað mítt egna forlag Frøi. Á hesum mínum egna forlagi havi eg givið nakrar bøkur út, eitt nú *Tilburðir í okkara øld* og *Aftur og fram.*

Vit hava eisini eitt alment forlag, sum kallast *Føroya Skúlabókagrunnur.* Við fáum undantøkum gevur hetta forlagið einans skúlabøkur út. So vítt eg veit, hevur hetta forlagið - tað størsta í landinum - ráðgevarar, sum leiðbeina høvundarnar.

Eitt annað stórt forlag er Bókadeild *Føroya Lærarafelags,* sum í mestan mun gevur út barnabøkur, men eisini annað. Eisini hetta forlagið hevur eftirlit við innihaldinum í tí, sum verður givið út.

So eru tað fleiri privat forløg, sum geva bøkur út. Ikki bara bøkur, sum eigararnir sjálvir skriva, men eisini bøkur, sum aðrir høvundar hava skrivað. Tvey tey størstu eru *Stiðin* hjá Zachariasi Wang og *Sprotin* hjá Jonhardi Mikkelsen. Nevnast skal eisini forlagið *Fannir* hjá Mariannu Debes Dahl og Árna Dahl og *Mentunargrunnur Studentafelagsins.*

Tað man sum heild vera torført hjá hesum forløgum at fáa tað at bera til. Tær flestu bøkurnar geva helst undirskot, nakrar fáar yvirskot. Ráðini kunna tí heldur ikki vera at hava ráðgevarar at leiðbeina høvundunum. Stundum, tá eg lesi eina føroyska bók - eina skaldsøgu ella eitt stuttsøgusavn, fyri tann skyld eisini eina søguliga ella siðsøguliga bók - vildi eg ynskt, at forlagsráðgeving hevði verið inni í myndini. So hevði uttan iva sumt verið strikað og annað broytt - til tað betra.

Spurningurin er so, um nakað gerst. Eg haldi tað hava týdning at hava fleiri forløg. Men man tað bera til at fáa eitt samstarv í lag millum privat feløg og td Skúlabókagrunnin um ráðgeving til høvundar? Eg haldi, at allar góðar kreftir áttu at sett seg niður at kanna tað hugskotið. Fæst tað í lag, so fer tað at gagna føroyskari bókaútgávu almikið.

Ein slík ráðgeving hevði ivaleyst sagt Jóannesi Kjølbro, at í einari krimiskaldsøgu skal dramatikkurin og spenningurin byrja á fyrstu síðu, ikki á síðu 45.

Hugskotið og tilmælið hjá Carl Johan Jensen um forlagsráðgeving er gott. Men tað hevði tíverri ikki nyttað nakað at sett hann í starvið sum ráðgevari, tí so hevði neyvan nøkur bók komið út á føroyskum aftur.

Uttan kanska hansara egnu.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3858**
**Navn:** P/F Týggjará
**Adressa:** 530 Fuglafjørður

**Kommuna:** Fuglafjarðar Kommuna
**Stovningardato:** 04.10.2004
**Viðtøkudato:** 04.10.2004
**Kapitalur:** Kr. 4.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 4.000.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** P/F Havsbrún, Høvdagøta 4, 530 Fuglafjørður (P/F 58).
**Nevnd:** Odd Eliasen, Mørkin 8, 530 Fuglafjørður (formaður), Justinus Leivssonur Justinussen, 480 Skáli og Kári Nielsen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Bogi Jacobsen, Miðrás 3, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum ella formanninum saman við einum nevndarlimi.
**Grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 04.10.2004 - 31.12.2005
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka alivinnu og allan handil sum stendst av hesum.

Skráseting Føroya tann 20. oktober 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2251**, P/F Enni, 512 Norðragøta.

**Navn:** P/F Enni
**Adressa:** 512 Norðragøta
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 2258, P/F Luna.

Skráseting Føroya tann 21. oktober 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2626**, Sp/f Metal, 640 Rituvík.

**Navn:** Sp/f Metal
**Adressa:** 640 Rituvík
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 3375, P/F F.J.M.

Skráseting Føroya tann 21. oktober 2004

Kristin Balle

---

# Kunngerð

Vísandi til kunngerð frá innlendismálaráðnum fer kommunuval fram

**týsdagin tann 9. november 2004.**

**Valið til Skopunar Bygdarráð fer fram á kommunuskrivstovuni.**

**Atkvøðutíðin er frá:**

**kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. november 2004.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða kommunuskrivstovuni frá, helst innan kl. 15.00, mánadagin 8. november 2004, á telefon 361349.

**Valkort:**
Valkort eru send út við postinum og um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

**Minnist til at hava valkortið við á val.**

*Tann 25. oktober 2004*

**Valnevndin í Skopun**
Sigurd Bærentsen, form.




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3375**, P/F F.J.M., 620 Runavík.

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. Sp/f 2626, Sp/f Metal, sum samstundis verður strikað.

Skráseting Føroya tann 21. oktober 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. sp/f 3332**, sp/f EHS-Betong, 900 Vágur.

**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Heri Silvurdal, 900Vágur.

Skráseting Føroya tann 25. oktober 2004

Kristin Balle

---





Aftur í ár verður Jólasølustevna á Giljanesi
27. - 28. november 2004

Teir handlar, fyritøkur og onnur, sum ætla at verða við, verða biðin um at siga frá á tel. 222 411

MIÐVÁGS RÓÐRARFELAG


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnagarðurin og vøggustovan við Velbastaðvegin**
Á stovninum ganga 101 børn. Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 10 børnum í hvørjari.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Barnagarðin og vøggustovuna við Velbastaðvegin eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2004 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi til eitt farloyvisstarv at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2004 ella eftir nærri avtalu. Farloyvistíðin er frá 1. desember 2004 til 31. juni 2005.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Monu R. Mohr, stovnsleiðara, ella Ingilín Berg, varaleiðara, á tlf. 31 43 73.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera Barnagarðinum við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. november 2004.




# Skeið

**Foto/myndaviðgerð við teldu (40 t)**
Lærari: Leif Andersen Tlf. 745091
***(byrjað verður í viku 45)***

---

**Lær at gera jóladekoratión (20 t)**
**- á loftinum í Pidda´sa handli**
Lærari: Steintóra H. Nesá Tlf. 444720
ella stein@kallnet.fo

Bólkur 1: 22.-24. nov. (má.-mi.) kl. 9.30-16.00
Bólkur 2: 25.-27. nov. (hó.-fr.) kl. 19.00-22.30 og leyg. Kl. 9.30-17.00

---

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**Tlf. 444087**